# 8 spurningar um jól

## Malan Marnersdóttir



***Hvat er tað besta við jólum?***
At vit hava frí, vitja ætt og vinir, lesa til stuttleika og hvíla. Og sosigst tað vera gott fyri heilsuna at geva og fáa gávur!

***Hvat er tað keðiligasta við jólum?***
At veðrið viðhvørt er ringt.

***Hvussu helt tú jól sum barn?***
Jólaaftan við hús, tá ið vit búðu í Havn vóru vit 1. jóladag hjá ommu og 2. dag úti hjá pápabeiggja ella øðrum í familjuni.

***Hvussu heldur tú jól í ár?***
Dagarnir verða býttir millum mammu mína og dóttrina, ommusonin og dótturmannin.

***Hvat heldur tú um jólaresið í desember?***
Mítt er ikki so ringt hesi árini, ommusonurin er ikki ár enn!

***Hevur tú nakrantíð hildið jól uttanlands?***
Ja ofta. Var einaferð í Aix-en-Provence á jólum og fór á matstovu saman við øðrum lesandi og fingu m.a. eitt kvørkveggjuslag at eta og til messu seinni um kvøldið. Har var hvørki kavi ella regn, men stak hugnaligt og gott. Eina aðra ferð vóru dóttirin og eg á Gran Canaria, men tað var eingin succes jólaaftan, tí mandlugreyt dugdu tey ikki at gera! Annars var tað fínt.

***Keypir tú sjálv/ur tínar jólagávur?***
Ja! Hvat tá?

***Hvat ynskir tú tær í jólagávu?***
Tað er eitt loyndarmál!


























